## Arsenal vann stórdystin

3. umfar av FA Cup var á skránni í vikuskiftinum, og her var lagt upp til satt brak, tá varandi meistararnir, Liverpool, tóku ímóti Arsenal á Anfield Road. Tomas Rosicky gjørdist stóra hetjan hjá Arsenal, eftir at hann sendi teir fram um bæði 1-0 og 2-0 í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki legði Liverpool eitt stórt trýst á Arsenal málið, og hetta gav úrslit, tá Dirk Kuyt minkaði um munin eftir hornaspark. Móti endanum avgjørdi Thierry Henry dystin fyri Arsenal, tá hann skoraði til 3-1, og sostatt er greitt, at Liverpool ikki fer at endurvinna stóru ensku steypakappingina í ár.

## Henke á blettinum

Nógv mundu hvøkka við, tá Manchester United boðaði frá, at teir høvdu keypt svenska áleyparan, Henke Larsson, frá Helsingborg. Tað vísti seg tó ikki at taka langa tíð hjá Henke at fáa fyrsta málið fyri United. Í vikuskiftinum fekk hann sín fyrsta dyst, tá United møtti Aston Villa í FA Cup, og 10 minuttir inn í seinna hálvleik legði Henke Larsson United á odda 1-0, og harvið skoraði hann í síni debut fyri stórfelagið. Seinni í dystinum javnaði Milan Baros fyri Aston Villa, men í yvirtíðini eydnaðist tað hjá Ole Gunnar Solskjaer at fáa sigursmálið fyri United.



# United og Arsenal víðari í FA cup




*Tomas Rosicky var ein av eyðsýndu leikarunum, tá Arsenal vann stórdystin í FA-cup ímóti Liverpool. Rosicky skeyt tvey av málunum*

*Mynd: Scanpix*

**Manchester vann á Aston Villa, og Arsenal vann stórdystin móti Liverpool í triðja umfari av FA cup. Charlton og Sheffiled United vórðu sligin út av liðum úr lægru deildunum**

FÓTBÓLTUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Triðja umfar í FA-cup kappingini varð leikt í vikuskiftinum, og hetta umfar er vorðið kent sum eitt "romantiskt" umfar, tí at tá koma tey størru liðini inn í kappingina og spæla mangan móti onkrum smærri liði. Tí hendir tað ofta, at Dávid vinnur móti Goliat í triðja umfari.

Hetta er elsta og mest søguríka steypakappingin í heiminum, og her fara vit at skriva um nakrar av dystunum í triðja umfari.

### Óvæntað úrslit

Hesaferð vórðu Premier League feløgini Sheffield United og Charlton sligin úr kappingini av liðum úr lægru deildunum.

Sheffield United leikti móti Swansea. Venjarin hjá Sheffield United, Neil Warnock, hevði valt at spara nakrar leikarar. Dysturin prógvaði, at hópurin er ov smalur, tí at Swansea smurdi teir av.

Kreppurakta Charlton spældi móti fyrrverandi stórliðnum Nottingham Forrest. Charlton hevur veruliga havt eitt vánaligt kappingarár higartil, og rákið vendi ikki í vikuskiftinum. Nottingham Forest vann dystin 2–0.

### Javnleikir

Fleiri av stóru Premier League feløgunum spældu eisini javnleikir ímóti smærri liðum, og hesi feløg verða noydd at leika ein umdyst, sum skal avgera, hvat lið fer víðari í kappingini. Hetta verður illa dámt av venjarunum, sum nú fáa ein dyst afturat í eini frammanundan pakkaðari dystarskrá.

Av javnleikunum kunnu nevnast, at Newcastle og Birmingham leiktu 2 – 2. Fyrrverandi felagið hjá Juliani Johnsson, Hull, leikti 1 – 1 móti Middlesbrough. Leicester og Fulham leiktu 1 – 1. Sheffield Wednesday spældi 1 – 1 móti Manchester City og Tottenham og Cardiff leiktu ein málleysan javnleik.

### Stórdystirnir

Risarnir Arsenal og Liverpool hittust leygardagin. Thomas Rosicky skoraði tvey mál tíðliga í dystinum, áðrenn Dirk Kuyt minkaði um munin. Afturvendi Thierry Henry skoraði tó til 3–1 við einum góðum einmansavriki, sum fekk nógvar Arsenal-fjepparar at vóna, at Henry aftur nærkast toppforminum.

Sunnudagin møttust Manchester United og Aston Villa. Henrik Larsson leikti sín fyrsta dyst fyri Manchester United, og hann skoraði fyrsta málið. Milan Baros javnaði fyri Aston Villa, men hin skandinaviski veteranurin hjá Manchester United, Ole Gunnar Solskjær, skoraði sigursmálið í yvirtíðini.

Alex Fergusson segði eftir dystin, at 35 ára gamli Henrik Larsson kann koma at skjóta týdningarmikil mál eins og gamla Mancester United hetjan Eric Cantona, so nú verður spennandi at síggja, hvussu fer at ganga hjá "Henke," sum hann verður kallaður, komandi dystirnar.

### Toppskjúttar í Atlantic Airways deildini:

| | | |
|---|---|---|
| Finnur Hansson | StÍF | 103 |
| Damir Oros | KÍF | 91 |
| Blagoje Buha | Neistin | 77 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 68 |
| Esbern Patursson | H71 | 68 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 67 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 61 |
| Sámal Joensen | VÍF | 59 |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 56 |
| Daniel Rapa | KÍF | 53 |

### Toppskjúttar í Sunset kappingini:

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 91 |
| Daiva Tuomaite | VB | 86 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 63 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 50 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 49 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 48 |
| Durita Christophersen | Stjørnan | 38 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 37 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 36 |

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 223 | 182 | 41 | 8 |
| 2 Neistin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 238 | 188 | 50 | 7 |
| 3 VB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 214 | 226 | -12 | 6 |
| 4 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 214 | 249 | -35 | 2 |
| 5 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 178 | 222 | -44 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 332 | 293 | 39 | 11 |
| 2 StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 300 | 295 | 5 | 7 |
| 3 Neistin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 347 | 328 | 19 | 6 |
| 4 KÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 292 | 310 | -18 | 5 |
| 5 H71 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 299 | 343 | -44 | 5 |
| 6 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 301 | 302 | -1 | 4 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 12 | 9 | - | 3 | 31 | 21 | 10 | 11 |
| 2 TB | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 14 | 14 | 10 |
| 3 Dráttur | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 9 |
| 4 SÍ | 12 | 7 | - | 5 | 26 | 22 | 4 | 8 |
| 5 KÍF | 12 | 2 | - | 10 | 19 | 30 | -11 | 2 |
| 6 Mjølnir | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 33 | -24 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 9 | 8 | - | 1 | 24 | 12 | 12 | 9 |
| 2 Mjølnir | 9 | 7 | - | 2 | 24 | 12 | 12 | 8 |
| 3 Fram | 9 | 4 | - | 5 | 16 | 20 | -4 | 4 |
| 4 Fleyr | 10 | 3 | - | 7 | 15 | 23 | -8 | 4 |
| 5 SÍ | 9 | 1 | - | 8 | 14 | 26 | -12 | 1 |